
Myndin er av Ocean Vanguard. Mynd: Harald Pettersen/Statoil

# Boripallar missa avtalur fyri 20 milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

26.02.2015 - 10:58

Oljan.fo

Tað er krevjandi at eiga boripallar fyri tíðina. Offshore.no skrivar at ongar nýggjar avtalur verða gjørdar, samstundis sum oljufeløgini siga frá sær avtalur fyri nógvar milliardir krónur.

Sambært Offshore.no eru 13 avtalur um leigu av boripallum uppsagdar, avtalur sum kundu givið eigarunum av boripallunum inntøkur fyri einar 20 milliardir danskar krónur. Talan er um avtalur av øllum slag, bæði stuttíðaravtalur og langtíðaravtalur sum eru uppsagdar.

Í norskum sjógvi eru fimm boripallar sum hava mist sínar avtalur. Statoil hevur sagt upp avtalurnar við Ocean Vanguard í norskum sjógvi og Stena Carron í Angola. Harafturat hevur Statoil í fyrstu atløgu útsett avtalurnar um fýra aðrar boripallar.

Í vikuni hevur Diamond Offshore almannakunngjørt at fleiri avtalure ru uppsagdar. Diamond hevur avtalur við Pemex, men fleiri av hesum avtalunum kunnu nú verða uppsagdar. Samráðingar eru millum Diamond og Pemex um hesar avtalurnar.

Dana Petroleum hevur boða frá at tey ikki ynskja at brúka boripallin Ocean Nomad hjá Diamond Offshore. Hesin pallurin skuldi upprunaliga fara at bora til heystar, men nú endar málið helst í rættinum. Diamond hevur longu sent eitt annað mál til rættin, og tað er avtalan við Statoil um Ocean Vanguard. Hetta málið kemur upp í rættinum til heystar.

Diamond Offshore sigur at tey fara í rættin við málunum, tí tey ynskja at verja síni áhugamál.